VB-Stjørnan 28-27(12-16):

# Eitt fantastiskt drama




*Við eini knallharðari verju helt VB Stjørnuni frá málunum fyrstu 11 minuttirnar eftir steðgin, og tað fær helst avgerandi týdning fyri FM-stríðið*

**Við einum teprum sigri á Stjørnuna í einum sera spennandi og dramatiskum dysti í Vági leygardagin, hevur VB nærum tryggjað sær meistaraheitið í kvinnuhondbólti**

SUNSET-KAPPINGIN

*Terji Nielsen,*
*terji@sosialurin.fo*

Høllin í Vági var fullsett og væl tað, tá ið tey bæði nógv tey fremstu kvinnuligu hondbóltsliðini í landinum brustu saman leygardagin í einum dysti, sum hevði ovurhonds stóran týdning fyri stríðið um FM-heitið. Karmarnir til dystin vóru optimalir, og lat tað verða sagt beinan vegin, at spælararnir livdu upp til hesar karmar, og vit fingu 60 minuttir, ið vóru fullir av intensiteti, drama, hugtakandi einmansavrikum, knallhørðum verjuspæli og frálíkum málum.

## Stjørnan fleyg avstað

Sum tað hevur víst seg mangan áður, tá ið júst hesi bæði lið bresta saman, so kann tað svinga ræ ttuliga nógv í dystinum. Soleiðis var eisini leygardagin.

Stjørnan fekk eina frálíka byrjan, og liðið úr Klaksvík sá leingi út til at fara at vinna ein stórsigur, ið kanska kundi verða eitt plástur á sárið fyri eyðmýkjandi ósigurin í Klaksvík fyrr í ár.

Gestirnir struku avstað, og heimaliðið megnaði als ikki at fóta sær fyrstu drúgvu løtuna. Stjørnan sýndi gott hugflog í álopsspælinum, og í hinum endanum stóð verjan sum ein múrur, og aftan fyri múrin stóð ein annar múrur, nevnliga Fríða Petersen í málinum, sum legði bragdliga fyri í oddadystinum.

VB fekk als ikki gongd á álopsspælið hjá sær, og tað tóktist einamest koma av tí, at spælskiparin Aukse Vysniaskaite ongantíð av álvara kom í gongd í dystinum leygardagin. Aukse royndi seg fleiri ferðir við skotum úti frá, ella við fríspælingum inn á strikuna, men tað kom so at siga einki burtur úr hjá henni í fyrra hálvleiki. Fjáltur kom nú á spælararnar á heimaliðnum, og nervarnir hingu uttaná. VB gjørdi eina rúgvu av tekniskum feilum, og fleiri ferðir var bólturin spældur beint í hendurnar á leikarunum hjá Stjørnuni.

Hetta merkti, at Stjørnan fekk eina dreymabyrjan. Gestirnir lupu avstað, og áðrenn fyrri hálvleikur var hálvrunnin, høvdu tær fingið sær eina leiðslu upp á sjey mál, og mótbrekkan hjá VB tóktist øgilig.

Men so líðandi kom VB fyri seg, og ikki minst var tað Asta í málinum, sum gjørdi sítt til, at heimaliðið skuldi fáa fatur á gestunum. Asta hevði fleiri frálíkar bjargingar, tá ið Stjørnan annars sá út til at avgerða dystin, og hesar bjargingar vóru við til at halda lív í vónunum hjá VB.

## Broyttu álopsspælið

Ein av orsøkunum til, at tað gekk so illa hjá VB í álopspartinum fyrstu løtuna av dystinum, tóktist verða, at alt allar royndir upp á mál skuldu fara umvegis annan av útlendsku spælarunum, Daivu Tomaite ella Aukse Vysniaskaite, og hetta gjørdi tað lætt hjá Stjørnuni at verja fyri. Men nakað út í dystin tóktist tað sum um, at tað vóru fleiri á heimaliðnum, ið tordu at bjóða